## Ungir fiskimenn sleppa ikki upp í part

Ungir fiskimenn eru serliga illa fyri at tí at bankarnir ikki sleppa at fáa veð í fiskirættindi.

– Taka vit sum dømi eitt skip, íð hevur eitt virði upp á tvær milliónir, men sum verður selt fyri 10 milliónir við fiskiloyvum, so er ikki ringt at skilja, at ein ungur maður við avmarkaðum eginpeningi, ið ætlar sær upp í fiskivinnuna, hevur ikki møguleikan fyri at fíggja eitt tílíkt skipakeyp, tá hann bert kann bjóða lánveitarunum veg í skipavirðinum upp á tvær milliónir krónur, sigur nevndin í Føroya Banka.

Hesin ungi maður hevur ongar møguleikar undir verandi skipan. Hevði hann hinvegin kunna bjóðað lánveitarunum veð í skipi og fiskirættindum, so er ikki óhugsandi, at hann hevði kunna fingið fígging til eitt tílík skipakeyp, sigur nevndin í Føroya Banka.

## Bankin vil hava veðhald í fiskiloyvum

Tað er ikki nøktandi, at reiðaríini ikki kunnu geva bankanum og øðrum lánveitarum, sum fíggja føroysku fiskivinnuna, veð í teimum fiskirættindum, ið eru knýtt at skipinum. Hetta sigur nevndin í Føroya Banka í sambandi við at aðalfundur varð hildin í bankanum mikudagin.

Bankin heldur, at tað er einki sum tala fyri , at manglandi rætturin at veðseta fiskirættindi er til fyrimunar fyrin fiskivinnuna. Heldur nakar tað, so er tað ein misskiljing. Tað kann ongantíð vera til vinnunar egna besta, at rætturin at ráða yvir rattindunum, sum hoyra til skipið, er avmarkaður, sigur nevndin í Føroya Banka.

Trupulleikin er, at manglandi rætturin at veðseta fiskirættindi bert hevur við sær, at reiðaríini fáa minni í láni, ella dýrari lán, enn tey annars høvdu fingið. Bankin heitur á myndugleikarnar at endurskoða reglurnar.

## Várróðurin gav misjavnt

Teir flestu sum hava róð út á Norðhavinum í ár hava vunnið gylt av pengi, tað besta nakrantíð. Og serliga hjá teimum bátum, har tað rættuliga lá fyri er nógv eftir á kistubotninum. Føroyski fiskimaðurin er ikki altíð so sinnaður at tosa um hvat hann vinnir og tí er ringt at fáa uppspurt ítøkiliga hvat várráðurin hevur givið.

Onkun bátur hevur fiskað upp í móti millióníni. Ein útróðrarmaður, Sosialurin tosaði við í gjar segði, at hjá teimum hevði ligið hampuliga væl fyri. Teir lógu í miðjuni og hann metti seg at hava tjent einar 70.000 krónur í várróðrinum.

# Fyrsti føroyski doktarin í samfelagsfrøði

**Samfelagsfrøðingurin Gestur Hovgaard vardi týsdagin Ph.D-ritgerð sína, ið snýr seg um, hvussu smá fiskivinnusamfeløg standa seg í alheimsgerðini. Samfelagsfrøðingurin stóð royndina, og Føroyar fingu sín fyrsta doktara innan samfelagsfrøði**

*Føroyska Tíðindastovan*



*Norski doktarin Otto Brox var oppunentur, tá Gestur Hovgaard vardi doktararitgerðina*
*Mynd: Føroyska Tíðindastovan*

Týsdagurin var ein søguligur dagur í føroyska útbúgvingarheiminum.

Tá vardi 35 ára gamli samfelagsfrøðingurin, Gestur Hovgaard, eina doktararitgerð – eina sonevnda Ph.D-ritgerð — á Roskilde Universitetscenter, RUC.

Verjan tók umleið tríggjar tímar tilsamans, og seinnapartin týsdagin hevði fyrsti føroyski doktarin í samfelagsfrøði staðið royndina.

Gestur Hovgaard úr Hovi starvast dagliga sum granskari á Granskingardeplinum fyri Økismenning, og hann undirvísir eisini á Fróðskaparsetri Føroya. Seinastu trý árini hevur hann millum annað arbeitt við Ph.D-ritgerðini, sum á enskum nevnist "Globalisation, Embeddedness and Local Coping Strategies".

### Ritgerð um fiskivinnusamfeløg

Ritgerðin snýr seg í stuttum um, hvussu smá fiskivinnusamfeløg kunnu standa seg í sonevndu alheimsgerðini ella globaliseringini, sum hon eisini verður nevnd.

Í ritgerðini verður staðfest, at fiskivinnubygdir ofta eru taparanir í globaliseringini, men kortini finnast fiskivinnusamfeløg, sum vísa búskaparliga megi og evni til at broyta seg.

Klaksvík og Båtsfjorden í Noreg eru sonevndar case'ir í ritgerðini, og Gestur Hovgaard roynir í verki sínum at finna fram til, hvørjar orsøkirnar eru til, at hesi bæði samfeløgini sum heild standa seg væl í alheimsgerðini.

– Ofta snúgva slíkar ritgerðir seg um viðurskifti í stórum londum og samfeløgum. Eg helt tað hinvegin vera spennandi at viðgera viðurskifti, sum hava týdning fyri smá samfeløg sum okkara, sigur Gestur Hovgaard.

### Almannakunngerast internationalt

Við verjuna av doktararitgerðini á RUC týsdagin sótu tilsamans tríggir sonevndir opponentar og settu Gesti Hovgaard kritiskar spurningar.

Opponentarnir vóru norðmaðurin Ottar Brox, bretin Bob Jessop og sviin Herman Smidt, ið allir hava fakligar røtur í samfelagsfrøðini. Fleiri føroyingar sótu eisini á áhoyraraðplássunum og fylgdu verjuni.

Næsta stigið hjá Gesti Hovgaard, eftir at Ph.D-verjan nú er farin afturum, er at almannakunngera partar av ritgerðini í altjóða høpi.

– Opponentarnir hava mælt mær til at almannakunngera nakað av tí, ið snýr seg um viðurskiftini í Klaksvík, sum í empiriskum høpi eru serliga áhugaverd, sigur Gestur Hovgaard.

# The North Atlantic – ein ráðstevna um fiskivinnu og umhvørvi

**The North Atlantic - ein ráðstevna um fiskivinnu og umhvørvi**

*Føroyska Tíðindastovan*



*Íslendski fiskimálaráðharrin Árni Mathiesen fer á luttaka saman við øðrum fiskimálaráðharrum á ráðstevnuni í summar*
*Mynd: Interseafood*

Nú er skráin løgd fyri stóru ráðstevnuna, sum verður hildin i Norðurlandahús-inum í summar og har serliga verður tosað um fiskivinnu og umhvørvið í Norðuratlantahavi. Stevnan verður hildin í døgunum 21 og 22 juli.

Við á stevnuni verða kend nøvn innan fiskivinnu. Anfinn Kallsberg, løgmaður setir stevnuna og Høgni Hoydal, landsstýrismaður skal stjóra stevnuni. Eisini verður aðalskrivarin hjá Norðurlandaráðnum Søren Christensen við.

Av kendum íslendingum verður fiskimálaráðharrin Árni Mathiesen, Siv Friðleifsdóttir umhvørvismálaráðharri, David Egilsson, stjóri fyri matvøruráðnum. Ragnar Árnason, professari í búskapi, Steingrímur J. Sigfusson og altingslimur.

Úr Danmark kemur aðalskrivarin fyri fiskivinnunevndina hjá ES, Steffen Smidt. Úr Skotldin fiskimálaráðharrin Rhona Brankin og úr Kanadan fiskimálaráðharrin Herb Dhaliwal. Úr Noregi kemur fiskimálaráðharrin Otto Gregersen.

Umboð vera eisini fyri landslutir. Úr Hetlandi kemur guvenørurin Tom Stove og úr New Foundlandi kemur ministarin fyri New Foundland og Labrador, Roger Grimes.

Úr Føroyum luttaka eisini Jørgin Niclasen, landsstýrismaður og Eyðun Eltør, oljumálaráðharri. Bogi Hansen skal halda ein fyrilestur um umhvørvið í havinum kring Føroyar.

Stevnan fer at enda við at ein yvirlýsing verður feld á blað.





## Gólvuppboðssølan

| Syslunummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 117 | GERÐISBÁTURIN | SNELLA | 34 |
| FD 123 | RIDDARIN | SNELLA | 143 |
| FD 131 | HØGHAMAR | SNELLA | 263 |
| FD 138 | BYRGI | SNELLA | 217 |
| FD 15 | ANNA MARIA | SNELLA | 423 |
| FD 16 | TINDUR | BOTNTROL | 718 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 540 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 1.550 |
| FD 205 | GRETA | SNELLA | 150 |
| FD 229 | CAMILLA | SNELLA | 70 |
| FD 263 | RÚNI | SNELLA | 140 |
| FD 283 | ÁLITIÐ | SNELLA | 137 |
| FD 32 | STAPIN | LÍNA | 604 |
| FD 322 | KLETTUR | SNELLA | 55 |
| FD 348 | SKORATINDUR | SNELLA | 786 |
| FD 355 | FRÍÐA | SNELLA | 81 |
| FD 386 | SLÆTTIKLETTUR | SNELLA | 90 |
| FD 390 | ELISABETH | SNELLA | 147 |
| FD 398 | HAVRENNINGUR | SNELLA | 326 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.439 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 639 |
| FD 50 | HAVBÚGVIN | SNELLA | 408 |
| FD 65 | EIK HELGADÓTTIR | SNELLA | 932 |
| FD 761 | GUNNVÁ | SNELLA | 1.108 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 262 |
| FD 855 | LÓMUR M/B | SNELLA | 84 |
| FD 884 | ÁLKAN | SNELLA | 123 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 77 |
| FD 981 | MÁSIN | SNELLA | 77 |
| FD1044 | MARIA | SNELLA | 30 |
| FD1108 | LUNA | SNELLA | 272 |
| FD1110 | ARCTIC | SNELLA | 77 |
| FD1116 | FRIDA | SNELLA | 274 |
| FD1119 | FJALLLAMBIÐ | SNELLA | 203 |
| FD1130 | SJÓBÚGVIN | SNELLA | 130 |
| KG 129 | BRATTABERG | SNELLA | 184 |
| KG 15 | BÁRAN | SNELLA | 33 |
| KG 170 | ELJAN | SNELLA | 144 |
| KG 172 | SYÐRATANGI | SNELLA | 135 |
| KG 176 | SVARTBAKUR M/B | SNELLA | 746 |
| KG 21 | KYRRASUND | SNELLA | 423 |
| KG 293 | FAGRAENNI | SNELLA | 1.138 |
| KG 391 | EYSTURHØVDIÐ | SNELLA | 230 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 74 |
| KG 471 | ØRNIN | SNELLA | 214 |
| KG 473 | NÚPUR | LÍNA | 227 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | SNELLA | 121 |
| KG 499 | ENNIÐ | SNELLA | 118 |
| KG 522 | SVARTABERG | SNELLA | 275 |
| KG 608 | HERDIS | SNELLA | 301 |
| KG 640 | HANSA | SNELLA | 59 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 89 |
| KG 666 | SJÓVARFOSSUR | SNELLA | 283 |
| KG 703 | HENNY | SNELLA | 83 |
| KG 716 | KARIN | SNELLA | 221 |
| KG 743 | ELSA | SNELLA | 235 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 97 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 181 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 188 |
| SA 280 | SNIGÁLVUR | SNELLA | 119 |
| SA 38 | VESTURBERG | SNELLA | 643 |
| TG 122 | FRÍÐHILD | SNELLA | 291 |
| TG 185 | EGIL | SNELLA | 436 |
| TG 283 | HERDIS | SNELLA | 95 |
| TG 300 | LÍÐARBRØÐUR V/H. JOENSEN | SNELLA | 1.106 |
| TG 303 | RICHARD Í SMIÐJUNI | SNELLA | 128 |
| TG 310 | SJÓRIDDARIN | SNELLA | 265 |
| TG 401 | BARBARA | SNELLA | 191 |
| TG 435 | JÓRUN | SNELLA | 225 |
| TG 460 | MARIANN | SNELLA | 298 |
| TG 471 | NÚPUR | SNELLA | 72 |
| TG 562 | TODNES | SNELLA | 104 |
| TG 576 | SVANUR | SNELLA | 298 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 521 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 337 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 297 |
| TG 731 | ANNIE M/B | SNELLA | 186 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 1.039 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 246 |
| TN 407 | MAGNUS HEINASON | BOTNTROL | 2.753 |
| TN 422 | NÓN | SNELLA | 131 |
| TN 805 | ANNA | SNELLA | 283 |
| TN 81 | THOMMAS | SNELLA | 197 |
| TN 810 | GÓÐIDRANGUR | SNELLA | 57 |
| TN 832 | HVÍTANES | SNELLA | 98 |
| TN 91 | LÓMUR | SNELLA | 194 |
| TN 919 | MORGUNROÐIN | SNELLA | 1.702 |
| TN 983 | JUVEL | SNELLA | 116 |
| VA 109 | ELLA | SNELLA | 401 |
| VA 135 | HAVFRÚGVIN | SNELLA | 302 |
| VA 141 | ÁLKUKLETTUR M/B | SNELLA | 1.015 |
| VA 143 | THURID | SNELLA | 87 |
| VA 164 | NIKLÁI | SNELLA | 197 |
| VA 213 | LEITISTANGI | SNELLA | 219 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 319 |
| VA 268 | ANDRIAS Á TÚALA | SNELLA | 62 |
| VA 269 | ANNA MARIA M/B | SNELLA | 383 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 794 |
| VA 294 | NESTANGI | SNELLA | 84 |
| VA 295 | THOVA | SNELLA | 566 |
| VA 304 | JÓNGERÐ | SNELLA | 142 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 457 |
| VA 327 | FORTUNA M/B | SNELLA | 328 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 527 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 531 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 321 |
| VA 9 | LÍÐARTANGI | SNELLA | 297 |
| VN 138 | ÓLAVUR | SNELLA | 194 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | SNELLA | 197 |
| VN 267 | JENNY M/B | SNELLA | 90 |
| VN 360 | VESTMENNINGUR | PARTROL | 2.014 |
| VN 378 | TURIÐ | SNELLA | 322 |
| VN 430 | RUÐITANGI | SNELLA | 347 |
| VN 447 | FRÍÐGERÐ | SNELLA | 71 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 151 |



DAGFØR
TEG
HALT
SOSIALIN
Tekna teg sum haldara nú, so ført tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum
Sosialurin

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin